# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Skoraðu trý mál og vóru vónbrotnir

**Hóast skrædl í 1. hálvleiki kendist tað í føroysku leguni sum vónbrot, at Estland vann fótbóltslandsdystin í Tallinn í gjárkvøldið 4-3**



*Christian Lamhauge Holst var farligi áloyparin hjá føroyingum í gjár við tveimum málum*

**ESTLAND-FØROYAR**
*Jákup Mørk*

Tað er bara eina ferð áður komið fyri, at Føroyar hava skorað trý mál í fótbóltslandsdysti á útivølli. Mikukvøldið varð málrokið frá oktober 1995 í San Marino, tá ið Todi Jónsson gjørdi hattrikk, endurtikið. Men tað var ikki nóg mikið fyri at vinna á Estlandi, og tað kendist sum stórt vónbrot, at 4-3 tap var í viðførinum hjá ferðalagnum, sum lendi í Vágum fyrrapartin.

Fýra úr donsku superliguni, ein úr fremstu deildini í Íslandi, ein úr næstbestu deildini í Danmark, ein úr næst-bestu deildini í Noregi og fimm úr Formula deildini. Soleiðis hevði Jógvan Martin Olsen sett manningina, sum frá fyrsta bríksli í góðveðrinum í Tallinn í gjárkvøldið umboðaði Føroyar.

Hesir komu undir ógvusliga trýstið, sum føroyska landsliðið mest sum hvørja ferð er undir fyrstu løtuna. Eftir lítlan hálvan tíma var 3-0 til heimaliðið, og føroyska skútan var um at kollsigla ella kanska var kollsigld.

Stóri álopsspælarin Vjatšeslav Zahovaiko skoraði tvær ferðir fyrsta korterið. Báðu ferðirnar var tað eftir horna úr høgru. Í fyrra førinum smekkaði hann eitt sindur úr vinstru bóltin upp í nettakið, eftir horna úr høgru, sum verjan hevði roynt at beina burtur, og í seinna førinum var tað úr heilt stuttari fjarstøðu. Eisini eftir horna í høgru.

Tað sá illa út, og júst sum tað kendist sum, at javnvág og luft var komin í, so leyp triðja skriðan. Estlendingar spældu seg væl inn í brotsteigin, og hóast tað var stutt millum føroysku spælararnar, so var Tarmo Kink púra leysur mitt fyri málinum, tá ið hann við høvdinum stýrdi innleggi eitt sindur úr vinstru í málið.

3-0 til Estland, og tað kundi havt verið meiri í 1. hálvleiki, tí í tveimum deyðbóltsstøðum høvdu mótstøðumenninir bóltin á træverkinum. Fyri nett tíggju árum síðani – 4. juni í 1998 – vann Estland 5-0 á sama vølli ímóti Føroyum, og tað kendist sum, at úrslitið í minsta lagi skuldi verða eins vánaligt..

Jógvan Martin Olsen staðfestir, at í 1. hálvleiki var avrikið ikki gott:

- Vit tora ikki at spæla, men sparka ov ofta langt. Teir fáa tvey mál burturúr deyðbóltsstøðum, og teir kundu havt fingið fleiri. Sovorðin mál hava vit annars ikki fingið ímóti okkum í trý ár. Eftir steðgin tora vit at bjóða okkum til og samanspæla, eisini burtur úr trongum støðum, og so gerst tað lættari. Í nærdystunum eru vit nógv avgjørdari í 2. hálvleiki, og tá fáa teir so at siga ongar upplagdar møguleikar, sigur venjarin.

## Spenningurin

Og so var tað, at alt vendi eftir lítlari løtu, og tað gjørdist so spennandi, sum eingin hevði ímyndað sær í steðginum.

Ongantíð áður hevur føroyska landsliðið gjørt so skjótt av við málskjótingini, sum tað gjørdi hesa ferð. Í 63. minutti minkaði Christian Lamhauge Holst um munin til 3-1, og sjey minuttir seinni stóð tað á jøvnum!

Brádliga hekk tað væl saman á føroyska liðnum, har superligu spælararnir syrgdu fyri málunum, meðan heimaliðið, sum í steðginum hevði framt tvær skiftingar og eitt korter eftir steðgin hevði skift tvífalda málskjúttan út, var strongt. Føroyingarnir tevjaðu møguleikan fyri endurtøku av sigrinum, sum varð vunnin á fyrstu vitjanini í Estlandi í 1997 (2-0), men tað eydnaðist ikki.

Tað var stórt vónbrot, at tað í staðin eydnaðist Estlandi at skjóta sigursmálið, tá ið tað var eitt korter eftir. Eftir uppspæl í vinstru og tvørtur um, varð bólturin úr 14 metrum lagdur tveir metrar út um brotsteigin til miðvallaran Jegveni Novikov. Hann smekkaði til, og bólturin streyk millum vinir og fíggindar og í málið aftanfyri Jákup Mikkelsen, sum tóktist ikki at síggja bóltin fyrrenn tað var ov seint.

Føroysku spælararnir hingu eitt sindur við nevinum, tá ið svenski dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð. Eftir skipbrot í 1. hálvleiki hevði tað eftir lítlari løtu eydnast at reisa seg, men so glapp javnleikurin og kanska møguligi sigurin føroyska liðnum av hondum.

- Fjórða málið fáa teir burtur úr ongum. Vit vóru væl mannaðir, tá ið innleggið kom, og tá ið bólturin varð lagdur út um feltið var støðan soleiðis, at teir ikki áttu at havt møguleika at fingið mál burturúr, heldur venjarin.

Tað hevði verið ræðuligt at komið til hús við sekki, sum 1. hálvleikur legði upp til. Hóast 4-3 tap, so ber til at arbeiða konstruktivt út frá avrikinum og úrslitinum í 2. hálvleiki!

## Estland-Føroyar 4-3 (3-0)

**119. altjóða skrásetti landsdystur Føroya**
**Vinardystur á A. Le Coq Arena í Tallinn mikudagin**
**4. juni 2008 kl. 19.00**
**2300 áskoðarar**

**Dómaratrio úr Svøríki:** Daniel STALHAMMAR, Joakim FLINK og Stefan HALLBERG
**Fjórði dómari úr Estlandi:** Hannes KAASIK
**1-0:** Vjatšeslav ZAHOVAIKO 9.
**2-0**: Vjatšeslav ZAHOVAIKO 14.
**3-0:** Tarmo KINK 28.
**3-1:** Christian Lamhauge HOLST 63.
**3-2:** Christian Lamhauge HOLST 66.
**3-3:** Súni OLSEN 70.
**4-3:** Jevgeni NOVIKOV 75.

**ESTLAND:** 1. Mart POOM (12. Artur KOTENKO, 46.) - 17. Enar JÄÄGER, 3. Andrei STEPANOV, 2. Igor MOROZOV, 13. Urmas ROOBA, 7. Ats PURJE, 6. Aleksandr DMITRIJEV (8. Jevgeni NOVIKOV, 46.), 14. Konstantin VASSILJEV (11. Aivar ANNISTE, 72.), 10. Sander PURI ( 22. Martin VUNK, 72.), 15. Tarmo KINK (20. Andrei SIDORENKOV, 59.), 27. Vjatšeslav ZAHOVAIKO (9. Vladimir VOSKOBOINIKOV, 59.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 25. Tihhon ŠIŠOV, 16. Mihkel AKSALU
**Gult kort:** Enar JÄÄGER 65.

**FØROYAR:** 1. Jákup MIKKELSEN, liðformaður, 56/-133, KÍ, - 2. Jónas Þór NÆS, 1/0, Køge, 5. Jóhan Troest DAVIDSEN, 4/0, NSÍ, 7. Fróði BENJAMINSEN, 48/2, HB, 3. Einar HANSEN, 5/0, NSÍ – 9. Jákup á BORG, 53/2, HB (11. Christian Høgni JACOBSEN, 41/2, HB, 45.), 15. Tem HANSEN, 3/0, Lyngby (12. Høgni MADSEN, 1/0, ÍF, 57.), 18. Súni OLSEN, 32/2, Viborg (4. Kári NIELSEN, 7/0, HB, 83.), 8. Símun SAMUELSEN, 17/1, Keflavík – 10. Rógvi JACOBSEN, 50/10, Hødd, 14. Christian Lamhauge HOLST, 11/2, Lyngby (6. Arnbjørn HANSEN, 3/0, EB/Streymur, 85.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. René TÓRGARÐ 0/0, EB/Streymur, 13. Herbert í Lon JACOBSEN, 0/0, B36, 17. Áki PETERSEN, 0/0, ÍF
**Gult kort:** Símun SAMUELSEN 58., Høgni MADSEN 82.
**Venjari:** Jógvan Martin OLSEN
**Hjálparvenjari:** Jens Martin KNUDSEN
**Liðleiðari:** Birgir HANSEN
**Lækni:** Kaj KALLSBERG
**Fysioterapeutar:** Álvur HANSEN og Øssur STEINHÓLM